Sandur, 14.11.2025

Til Løgmansskrivtovuna

Hoyringssvar til “Uppskot til løgtingslóg um Suðuroyartunnilin við tilhoyrandi tunnilskervum og vegakervum”

Valda linjuføringin úr Skarvanesi til Sandvíkar kemur at hava ógvusligar avleiðingar fyri Sandoynna.

Á Sandoynni skilja vit ógvuliga væl ynski um ein tunnil til Suðuroyar. Fast samband hevur avgjørt sínar fyrimunir. Við valdu linjuføringini verður Sands bygd tann stóri taparin, tí bygdin verður ein gjøgnumkoyring fyri allari ferðsluni til og frá Suðuroynni. Bygdin er tvídeild, flestu húsini eru vestanfyri Sandin, meðan býlingarnar í Sondum, Sandabrekkan og Traðir liggja eystanfyri. Hvønn dag ferðast børn og vaksin á súkklu og til gongu ímillum eystaru býlingarnar og bygdina. Hóast ferðslan er vaksin munandi síðani Sandoyartunnilin lat upp, er tað framvegis á einum hampuliga lágum støði (uml. 800-900 bilar um samdøgrið, sambært teljing hjá Landsverki í oktober 2024). Um suðuroyarferðslan legst afturat, kemur bygdin í enn størri mun at verða skorin í tvey, til stóran ampa og váða fyri øll, ið ferðast ímillum, serliga um tað er til gongu ella á súkklu. Tað eru fleiri syndarlig dømir um hettar aðrastaðni í Føroyum, har landsvegir skera ígjøgnum bygdir uttan fyrilit til íbúgvarnar á staðnum. Tað átti ikki at verði neyðugt at endurtikið somu mistøk ferð eftir ferð.

Á Sandafløttinum, ímillum býlingarnar, er helst besta veltujørð í landinum. Hetta er eisini ímyndin av Sandoynni sum tann grøna oyggin. Traðir er árliga karmur um vælumtókta Eplafestivalin og tey seinastu árini hevur víkingafestivalur verið við Mølheyggjarnar. Bæði tiltøkini eru væl vitjaði, men ivasamt er, hvussu hugaligt tað verður at skipa fyri hesum ella øðrum tiltøkum í økinum, tá ein stórur landsvegur fer tvørtur ígjøgnum øki.

Suðuroyartunnilin verður tann fimti undirsjóvartunnilin. Við øllum undirsjóvartunlunum, sum eru gjørdir higartil, hava verið ymsir vansar í mun til valdu linjuføring og tilhoyrandi innkomuvegum. Í Sandavági og Miðvági mugu tey enn, 22 ár eftir, liva við, at nógv og tung ferðsla koyrir ígjøgnum bygdirnar. Har eru javnan røddir frammi um, at ferðslan eigur at leiðast uttanum bygdirnar. Í Leirvík máttu tey í fleiri ár liva við, at ferðslan skuldi ígjøgnum bústaðarøki, áðrenn ein nøktandi loysn fanst, hóast hendan loysnin neyvan er tann best møguliga, um rætt hevði verið borið at frá byrjan.

Á hoyringsfundi á Sandi, í samband við at lógaruppskotið var til hoyring fyrru fer, bleiv nevnt, at ein norsk kanning vísir, at longri koyritíðin er millum tey støðini ið skulu nýta tunnilin, minni verður ágóðin av tunlinum. Tað má tí vera av alstórum týdningi fyri suðuroyingar, at farleiðin ikki gerst longri enn neyðugt. Um tunnilsmunnin verður úr

Djúpadali, so verður tann samlaða farleiðin úr Suðuroynni, til Havnar og aftur einar 15 km longri enn neyðugt.

Ein tunnilsloysn norðanfyri Sandsbygd er tí ikki bert ein fyrimunur fyri Sandoynna, men hevði eisini stytt munandi um samlaða teinin úr Suðuroynni til Havnar. Umframt styttri ferðatíð, so hevði tað eisini gjørt samlaðu farleiðini munandi meira mótstøðuføra fyri kava og vindi.

Vegaføring eftir Traðarhamri, ella tunnil ígjøgnum hamaran hava verið nevnt sum alternativ til vegaføringina ígjøgnum bygdina. Tær loysninirnar er tó ikki kannaðar nærri, og er tí heldur ikki búgvin at taka støðu til. Av somu orsøk er tað heldur ikki forsvarligt at taka avgerð um at tunnilsmunnin skal vera í Djúpadali, áðrenn ein loysn er fyri vegaføringini til og frá tunnilsmunnanum.

Í útvarpstíðindunum hjá Kringvarpinum 2. desembur 2024 kl. 18.00 gjørdi Teitur Samuelsen tað ógvuliga greitt, at P/F Suðuroyartunnil ikki tekur nøkur atlit til vegaføringina á Sandoynni, men bert hvat teir meta best í mun til sjálvan tunnilin.

Tað er skilligt, at P/F Suðuroyartunnil arbeiðir fyri at avmarka egnar váðar á verkætlanina. Tó er tað púra óskiljandi at Landsstýri ikki lurtar eftir m.ø. Landsverki ið tekur fleiri atlit enn bert, hvussu tunnilin gerst so stuttur sum gjørligt.

Politiska skipanin tykist greið yvir trupulleikarnar við linjuføringini, ið P/F Suðuroyartunnil arbeiðir við, men ynski um tunnil til Suðuroyar vigar eftir øll at døma meira enn øll onnur atlit.

Av einari ella aðrari orsøk, velur politiska skipanin at síggja burtur frá allari ráðgeving, ið ikki sigur tað í hon vil hoyra. Tað sær út til, at tað framvegis er álitið frá meirilutanum í arbeiðsbólkinum frá 2019, sum liggur til grund fyri øllum avgerðum ið er tiknar síðani. Landsverk hevur í fleiri umførum staðiliga mælt frá linjuføringini ið P/F Suðuroyartunnil arbeiðir við.

Ein linjuføring norðanfyri Sands bygd hevði ikki kosta munandi meira, tá allar avleiddar verkætlanir eru taldar við. Har afturat hevur tann loysnin eitt betri NNV enn loysnin sum P/F Suðuroyartunnil arbeiðir við. Loysnin hjá P/F Suðuroyartunnil gevur eina skeiklaða mynd av samlaða kostnaðinum, tí kostnaðurin av vegaføring á Sandoynni er enn ókendur, og tekur eingi atlit til náttúru, umhvørvi ella trivnað í økjunum ið verða rakt.

Linjuføringin sum Jón Sigurdsson saman við øðrum skeyt upp, var góðar 800 m. longri enn uppskotið hjá P/F Suðuroyartunnil og meirkostnaðurin tá Skúvoyggin er tikin við einar 22 mió. kr. Í útrokningum til avgerðarnotatinum hevur tunnilsfelagið tó longt tunnilin norðanfyri Sandsbygd. Tíverri er torført at hava álit á at avgerðarnotið lýsir báar loysnirnar á objektivum grundarlagi. Tvørturímóti tykist tað sum um at niðurstøðan er gjørd fyrst, og

síðani verður grundgivið so at tað passar til niðurstøðuna. Eftir mínum tykki eru so nógvar óvissur í avgerðarnotatinum, at tað ikki kann nýtast sum grundarlag at takað eina avgerð útfrá. Sostat eru enn somu ivamál galdandi sum áðrenn Løgtingið fór í summarfrí.

Tilflytarar á Sandi

Vit fluttu til Sands stutt eftir at byrjað var at spreingja Sandoyartunnilin. Vit hava ikki familjubond í oynni og hevði tunnilin ikki verið í ger, høvdu vit helst ikki flutt suður. Hinvegin var tað vakra umhvørvið á Sandi, Sandurin, Mølheyggjarnar, Sandsvatn og grøna umhvørvið kring velturnar, ið gjørdi bygdina tiltalandi fyri okkum. Eisini vigaði tað sera høgt, at her er trygt og friðarligt hjá børnum at vaksa upp. Vit búgva tætt upp at vegnum ímóti Sandalíð. Tá vit fluttu suður var tað mest bert ferðsla í samband við Teistan, ímillum túrarnar var tað heilt lítið av ferðslu. Nú Sandoyartunnilin er latin upp er ferðslan økt og serliga tunga ferðslan er økt nógv. Skal øll ferðslan til og frá Suðuroynni leggjast afturat, so fer tað helst at koma uppá eitt støði, har tað kemur at ganga útyvir trivnaðin í økinum og ávirka møguleikarnar at ferðast í økinum uttan bil.

Atgongdin til Sandin og Mølheyggjarnar verður avskorin av einum tungt trafikeraðum vegi.

Tað sum í stóran mun gjørdi bygdina tiltalandi fyri okkum, tykist lutvíst at hvørva, um vegurin ígjøgnum Sandsbygd í framtíðini verður høvuðsfarleið til Suðuroyar. Verður tað veruleiki kann væntast, at vit og helst eisini onnur í somu støðu, koma at umhugsa at flyta av oynni aftur.

Ferðsla

Í dag koyra um 800-900 bilar dagliga eftir Sandafløttinum. 1.400 bilar (helst fleiri), afturat verandi ferðslu er sostatt ein øking á uml. 150%, sum má sigast at vera ein ovurstór øking, sum kemur at hava stóra ávirkan á trivnað og umhvørvi fram við vegnum. Tað er eitt problem, at tað áhaldandi verður sagt, at tað verður ein lítið trafikeraður vegur, tí hóast tað kanska ikki er á hædd við onnur støð norðanfyri, verður tað ein stór øking í ferðslu í mun til øki, sum tað er í dag. Summi hús liggja heilt tætt út til vegin. Eitt er bara tað faktum at bilarnar koyra har, men havast skal í huga, at hetta fer at hava nógva ljóð, ljós og luftdálking við sær í einum annars friðarligum øki.

Landsvegir verða so vítt møguligt lagdir uttanum bygt øki, bæði fyri at ferðslan skal glíða betri og so vítt møguligt kunna koyra 80 km/t. Ein orsøk er helst eisini, tí at mann veit at tung ferðsla ikki hóskar seg væl í bygdum øki, har tað eisini gongur útyvir trivnaðin og møguleikar av ymsum slag framvið vegnum.

Ferðslan til og frá Suðuroyrtunnlinum kemur í høvuðsheitum ikki at hava ørindi í bygdini, men bert skal koyra ígjøgnum. Sannlíkt er tí, at hendan ferðslan eisini kemur at koyra við hægri ferð, óansæð hvat hámarksferðin í økinum er.

Avleiðingarnar fyri Sands bygd og øki kring Stóravatn og Djúpadal/Skarvanes eru sum heild ógvuliga illa lýstar í løgtingslógini og flestu fylgiskjølunum.

Umhvørvisárin

Tað verður sagt at atlit verður tikið til umhvørvið í samband við tunnilsverkætlanina, men tað er ógvuliga lítið ítøkiligt. Tað er eisini ógvuliga avmarkað hvørji krøv verða sett til P/F Suðuroyartunnil í mun til umhvørvið, um nøkur ítøkilig krøv yvirhøvur verða sett?

Tíverri eru tað alt ov fá, ið hava upplivað tann serliga friðin og umhvørvið kring Stóra vatn. Helst er tað tí at økið ikki er serliga kent millum føroyingar, at tað ikki hevur vakt størri ans ímillum fólk, hvat tað er, sum kann fara fyri skeyti um heilt fá ár.

Í Sondum eru elstu fornleivdirnar ið eru funnar í Føroyum, hvørja ávirkan kemur økt ferðsla at hava á tær?

Tilbúgving

Tað má vera ein fyrimunur fyri tilbúgvingina í Suðuroyartunlinum, um tunnilsmunnin liggur so tætt upp at Sandoyartunnlinum sum gjørligt. Á tann hátt kann tilbúgvingin á Sandi skjótt verða á staðnum, í mun til um tað skal koyrast til Djúpadals. Í einum so longum tunli, sum Suðuroyartunnilin verður, hevur reaktiónstíðin nógv at siga. Í váðametingum sum P/F Suðuroyartunnil hevur fingið gjørt, stendur at mann í Sandoyartunlinum hevur valt bert at hava tilbúgving Streymoyarmegin. Hettar er ikki rætt, tí tað bleiv sett krav um at tilbúgving eisini er á Sandi. Er tað kannað í hvønn mun tað styrkir tilbúgvingina í Suðuroyartunlinum, at tilbúgving er tøk beint við tunnilsmunnan Sandoyarmegin, um tunnilsmunnin er norðanfyri Sandsbygd?

Tað er sannlíkt, at Tórshavnar Sløkkilið kemur at hava onkran leiklut í mun til tilbúgvingina í Suðuroyartunnlinum. Um so verður, so er tilkallstíðin eisini munandi stytri um tunnilsmunnin er norðanfyri Sands bygd.

Niðurstøða

Sandingar flest eru á einum máli um, at ætlaða linjuføringin kemur at verða til óbøtiligan skaða fyri bygdina og týðandi náttúruna í oynni sum heild.

Vegaføringin á Sandoynni má verða ein partur av løgtingslógini og tað skal sjálvsagt vera ein vegaføring, sum ikki gongur ígjøgnum Sands bygd.

Við vón um at vera hoyrd og tikin í álvara.

Vinaliga

Baldur og Barbara av Skarði, borgarir í Sands Kommunu